# KOMMUNAL ÚTBOÐ OG INNKEYP

Spurnakanning millum føroyskar fyritøkur um teirra royndir við kommunalum útboði og innkeypi.



**Kappingareftirlitið hevur spurt fyritøkur í útvaldum vinnugreinum um teirra royndir við kommunalum útboði og innkeypi.**

**Almenni og kommunali geirin er, eins og í okkara grannalondum, ein stórur partur av búskapinum. Tí hevur tað týdning fyri føroyskar fyritøkur og samfelagið sum heild, at tað eru javnbjóðis møguleikar millum fyritøkur at bjóða sínar tænastur og vørur til almenna- og kommunala geiran.**

**Í Føroyum eru tað einans almennu stovnarnir, ið eru bundnir av reglum um útboð og innkeyp sambært rundskrivi[1]. Kommunurnar hava onga skyldu at fylgja hesum reglum, og hetta kann elva til spurningar um gjøgnumskygni, rættvísi og kappingarjavnvág.**

**Hvussu uppliva føroyskar fyritøkur kommunal útboð? Verður mismunur gjørdur grundað á staðseting ella persónlig sambond? Og hvussu er við mutri og sviki?**

## 1. Inngangur

Í einum lítlum samfelagi sum tí føroyska, har marknaðurin er avmarkaður og viðurskiftini eru smá, er tað avgerandi, at avgerðir hjá kommunum og almennum stovnum verða tiknar á einum fakligum og sakligum grundarlagi. Tað kann tykjast óskaðiligt at velja ein staðbundnan veitara fram um ein annan. Men tá staðseting, persónlig sambond ella vani fáa størri týdning enn dygd og prísur, hava slík val størri avleiðingar enn tey fyrst tykjast. Úrslitið kann gerast, at kappingin á marknaðinum verður veikari, og at borgarin í síðsta enda rindar ov nógv fyri vánaligar loysnir.
OECD hevur víst á, at manglandi gjøgnumskygni og ógreiðar útboðstilgongdir kosta samfeløgum nógvar pengar, serliga í smáum marknaðum, har fáir veitarar og tøtt persónlig sambond gera støðuna viðkvæma. [2] Tá kappingin verður avmarkað, missir vinnan íblásturin til at menna nýskapandi loysnir, og veitarar eru ikki eggjaðir at bjóða lægri prísir og bestu dygdina. Tað ger, at kommunur og stovnar í ringasta føri velja loysnir, sum hvørki eru tær bestu ella tær bíligastu. Tá grundarlagið fyri avgerðum eru persónlig sambond heldur enn fakligar metingar, er vandi fyri mismuni, skeivleika og í serligum førum mutri og sviki. Slík atferð skerjir álitið á almennu skipanina og ger marknaðin minni virknan og minni rættvísan.
Í Føroyum, har viðurskiftini eru smá, er tað sera týdningarmikið, at øll hava somu møguleikar og at útboðs- og innkeypsskipanir eru almennar, gjøgnumskygdar og væl skipaðar. Bert við greiðum krøvum, háttalagi og sakligum mannagongdum, verður tryggjað, at avgerðir verða tiknar á einum fakligum grundarlagi. Við hesum vil tann rætti veitarin vinna, og borgarin fær bestu dygd fyri sínar skattapengar.

## 2. Kanning hjá Kappingareftirlitinum

Tað er ikki óvanligt at Kappingareftirlitið fær fyrispurningar frá fyritøkum um kommunal og almenn útboð, har fyritøkurnar hava havt eina fatan av at tað ikki er farið heilt rætt fram. Framíhjárættur til staðbundnar veitarar, framíhjárættur hjá vinum og kenningum og mutur og svik hevur alt verið nevnt í hesum klagum sum Kappingareftirlitið hevur viðgjørt.
Í samband við at Kappingareftirlitið hevur viðgjørt nakrar av hesum klagum, hevur tað staðfest at tað ofta eru avbjóðingar í sjálvum útboðstilfarinum sum leiðir til at útboðið ikki fær tað úrslitið sum ætla. Um útboð ikki verða gjørd á ein skynsaman hátt, kunnu tey í versta føri hava eina skaðiliga ávirkan heldur enn at fáa tað fullu nyttuna eitt slíkt útboð miðar eftir.

Kappingareftirlitið hevur tí valt at gera eina spurnakanning, har vinnan er spurd um teirra fatan av kommunalum útboði og innkeypi.
Spurnakanningin tekur støði í føroyskum fyritøkum og teirra luttøku í kommunalum útboðum. Kannað er, um fyritøkurnar meta seg hava verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunal útboð.
Kappingareftirlitið hevur fingið innlit í hvørjum vinnugreinum, kommunal útboð og innkeyp oftast eru í. Spurnakanningin er send til fyritøkur í hesum vinnugreinum.
Kanningin er gjørd við at spyrja føroyskar fyritøkur um teirra fatan av støðuni. Tískil kann hon ikki ítøkiliga

[1] Rundskriv nr. 9003 frá 01. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum, Fíggjarmálaráðið

[2] [Integrity in public procurement | OECD]

staðfesta hvussu støðan í veruleikanum er. Hóast tað eru útvaldar fyritøkur sum eru bjóðaðar at svara uppá spurnakanningina, so er tað sjálvboðið um tær ynskja at svara. Tí kann hugsast at tær fyritøkur sum hava sterkar meiningar, eru meira áhugaðar í at luttaka. Tó hevur meira enn ein triðingur av spurdu fyritøkunum svara, og tískil metir Kappingareftirlitið at tilfarið er sigandi.

Spurnakanningin var send út til 1.102 fyritøkur, og 425 hava svarað spurningunum. Spurnakanningin kundi svarast í tíðarskeiðinum 01.12.2025 til 01.01.2026.

## 3. Eyðkenni hjá luttakandi fyritøkum

Kappingareftirlitið ynskir, at kanna hvørt eyðkennini hjá fyritøkunum hevur ávirkan á, hvussu tær hava kent seg viðfarnar í kommunalum útboði og innkeypi. Tí er spurt um hvørja staðseting fyritøkan hevur, mongd av ársverkum í fyritøkuni, aldur á fyritøkuni og umsetningurin hjá fyritøkuni. Hetta brot er ein lýsing av eyðkennunum hjá luttakandi fyritøkunum.

### 3.1. Staðseting

Stabbamyndin niðanfyri vísir staðsetingina hjá teimum fyritøkum, sum hava luttikið í spurnakanningini. Stabbamyndin sigur hvar luttakandi fyritøkurnar eru skrásettar og hon vísir at fyritøkur úr øllum høvuðsøkjum í Føroyum hava tikið lut. Sum sæst á stabbamyndini, er Suðurstreymoy tað økið, har flest fyritøkur eru staðsettar. Næst størsti bólkurin er Eysturoy, og síðani koma Norðoyggjar og samansetti bólkurin Uttanlands/Vágar/Norðstreymoy, sum eisini mynda ein týðandi part av luttakarunum. Minsti bólkurin er Suðuroy/Sandoy.

**Ritmynd 3.1.** Staðseting hjá luttakandi fyritøkum




Stabbamyndin omanfyri vísir hvussu tær 425 luttakandi fyritøkurnar eru spjaddar. Hetta fylgir nøkulunda landafrøðiligu fólkasamansetingini í Føroyum, og tí verður mett at í mun til staðseting er kanningin umboðandi.

### 3.2. Støði

Stabbamyndin um støðd vísir, hvussu stórar fyritøkurnar eru, sum hava luttikið. Her sæst, at fyritøkur við 1–4 starvsfólkum er greitt tann størsti bólkurin.

Fylgjandi sæst at luttakaratalið minkar fyri hinar bólkarnar, har fyritøkur við 5-9, 10-19 og 20 ella fleiri ársverkum eru umboðaðar av ímillum 25 og 45 fyritøkum.

**Ritmynd 3.2.** Ársverk hjá luttakandi fyritøkum




## 3.3. Aldur

Stabbamyndin niðanfyri vísur aldurin á teimum fyritøkum, sum hava luttikið í spurnakanningini. Flestu av fyritøkunum liggja í aldursbólkinum 1–5 ár, og eru hesar 157 í tali. Hetta vísir, at ein týðandi partur av teimum, sum luttóku, eru fyritøkur í byrjanar- ella uppbyggingarstøði, har kapping og útboð hava stóran týdning fyri menningarmøguleikar.

**Ritmynd 3.3.** Aldur á luttakandi fyritøkum




Minsti bólkurin eru fyritøkur, sum eru yngri enn eitt ár, og tær eru 28 í tali. Eisini er ein hópur av eldri fyritøkum í spurnakanningini, og hetta gevur eina góða blanding av royndum. Hetta ger aldursamansetingin breiða og gevur eina fjølbroytta mynd av sjónarmiðum og royndum í mun til kommunalt útboð og innkeyp.

## 3.4. Umsetningur

**Ritmynd 3.4.** Umsetningur hjá luttakandi fyritøkum




At enda vísir stabbamyndin omanfyri, hvønn umsetning luttakandi fyritøkur hava. Meirilutin av fyritøkunum hevur ein umsetning undir 5 mió. kr., og størsti bólkurin eru fyritøkur við einum umsetningi undir 500.000 kr., tær eru 141 í tali. Hetta vísir at tað eru flestar smáar fyritøkur ið hava luttikið í spurnakanningini.

## 3.5. Hvørjar fyritøkur hava luttikið í kommunalum útboði og innkeyp

Í Spurnakanningini er ein stórur partur sum ikki hevur nakrar royndir við kommunalum útboði og innkeypi. Kappingareftirlitið ynskir at vita um har er munur á hugburðinum um fyritøkurnar hava royndir ella ikki við kommunalum útboði og innkeypi. Tí vórðu allar spurdar fyritøkur bidnar um at svara, eisini tær sum aldrin hava luttikið. Í stabbamyndini niðanfyri sæst hvussu stórur partur hevur luttikið í kommunalum útboði og innkeypi.

**Ritmynd 3.5.** Hevur fyritøkan nakrantíð luttikið í kommunalum útboði ella innkeypi?




Her síggja vit at áleið ein triðingur av luttakandi fyritøkunum hava royndir við kommunalum útboði og innkeypi. Størsti parturin av hesum siga seg hava luttikið av og á, ímeðan ein lítil partur sigur seg luttaka regluliga. Samlað eru tað 147 fyritøkur sum siga seg hava royndir við kommunalum útboði og innkeypi.

Her skal havast í huga, at bert tær fyritøkur, ið hava royndir við kommunalum útboði og innkeypi hava fingið fullu spurnakanningina.
Tí hava bert fyritøkur við royndum svara spurningunum í parti 4.1, 4.3 og 5.1-5.3.

Samanumtikið hevur hendan kanningin fingið svar frá einum breiðum skara, har fyritøkur úr øllum landinum, bæði smáar og stórar hava luttikið. Tí kann sigast at svarini í stóran mun eru sigandi fyri spurdu vinnugreinarnar.

## 4. Hvussu uppliva føroyskar fyritøkur kommunalt útboð og innkeyp

Í hesum broti verður lýst hvussu føroyskar fyritøkur hava kent seg viðfarnar í samband við kommunalt útboð og innkeyp, og verður hugt at hvussu tey ymisku eyðkennini kunnu ávirka hvussu fyritøkur kenna seg viðfarnar.

### 4.1. Hava fyritøkurnar í Føroyum kent seg verið fyri órættvísi?

Kanningin er í fyrstu atløgu gjørd fyri at staðfesta hvørjar royndir vinnulívið hevur við kommunalum útboði og innkeypi. Tí verður fyrst spurt um føroyskar fyritøkur kenna seg hava verið fyri órættvísari framferð í hesum høpi. Niðanfyri sæst stabbamynd sum vísur hvat fyritøkurnar svara.

**Ritmynd 4.1.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð havt varhugan av at tær hava verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunalt útboð og innkeyp?




Her sæst at stívliga ein triðingur av fyritøkunum í spurnakanningini við royndum frá kommunalum útboði og innkeypi meta seg hava verið fyri órættvísari framferð. 34,0% siga ja, 44,2% siga nei og 21,8% siga at tær ikki vita.

### 4.2. Hvat halda føroyskar fyritøkur yvirhøvur um hvussu kommunalt útboð og innkeyp verður fari fram?

Kappingareftirlitið hevur spurt bæði fyritøkur við og uttan royndir frá kommunalum útboði og innkeypi, um kommunal útboð og innkeyp eru væl skipað.

Fylgjandi eru tríggjar stabbamyndir sum lýsa hvat fyritøkurnar halda um týdningin av staðseting í kommununi sum bjóðar út (4.2.), kennskap í kommununi sum bjóðar út (4.3.) og óreiðiligum gerðum (4.4.).[3]

[3] *Við staðseting verður sipa til at føroyskar kommunur geva framíhjárætt til fyritøkur sum er staðsettar í somu kommunu. Við persónligum sambondum verður sipa til har fyritøkur hava persónligan kennskap til eitt fólk ið er partur av avgerðini um eitt útboð ella innkeyp, og tí gevur framíhjárætt til hesa fyritøku. Við óreiðiligum gerðum verður sipa til t.d. svik og mutur, har tvingsil ella pengar undir borðinum kunnu leiða til at ein fyritøka fær eitt útboð.*

**Ritmynd 4.2.** Hevur staðseting í kommununi sum bjóðar út týdning í samband við kommunalt útboð og innkeyp.




Omanfyri sæst, at fyritøkur uttan royndir hava eitt vet størri álit á at kommunurnar ikki taka staðbundnar fyritøkur framum. Hetta sæst við at 54,4% svara ja uppá spurningin um tað hevur týdning, ímóti 59,6% av teimum sum hava royndir sum svara ja. Eisini framgongur at fyri báðar bólkar, hava fleiri svara ja enn nei.

**Ritmynd 4.3.** Hevur persónligt samband við fólk ið starvast í kommununi sum bjóðar út týdning í samband við kommunalt útboð og innkeyp.




Tá tað kemur til kennskap í kommununi er øvugt. Her meta fyritøkur uttan royndir, at kennskapur hevur týdning fyri hvør vinnur útboðið. 68,4% av fyritøkum uttan royndir svara at tað hevur týdning, ímeðan 62,0% av fyritøkunum við royndum svara at tað hevur týdning. Fyri allar partar er tað enn so, at tann størsti parturin metir at tað hevur nakað siga.

**Ritmynd 4.4.** Hava óreiðiligar gerðir týdning í samband við kommunalt útboð og innkeyp.




Tá ið tað kemur til óreiðiligar gerðir, minkar parturin sum heldur at tað hevur týdning munandi. Munurin ímillum fyritøkur við og uttan royndir er størri til hendan spurning. 35,8% av fyritøkunum uttan royndir svara at óreiðiligar gerðir hava týdning, ímeðan 26,0% av fyritøkunum við royndum halda at óreiðiligar gerðir hava týdning. Mótstatt stabbamyndunum fyri staðseting og persónlig sambond, er munurin her eitt vet størri og kann geva eina fatan av at fyritøkur uttan royndir halda at fleiri óreiðiligar gerðir eru partur av kommunalum útboði og innkeypi enn tær sum hava royndir á økinum. Tað sæst eisini at ein nógv størri partur heldur seg ikki vita um óreiðiligar gerðir eru ein partur av kommunalum útboði og innkeypi.

Ritmynd 4.4. gevur eina ábending um, at tað eru møguligir fordómar ímillum fyritøkur uttan royndir um hvussu kommunal útboð og innkeyp fara fram, tá ið tað kemur til óreiðiligar gerðir. Tað er ikki óhugsandi at slíkir fordómar hava eina ávirkan á hvussu nógvar fyritøkur tíma í hált við kommunalt útboð. Hetta kann vera við til at minka um luttakarar, sum síðani minkar um kappingina.

### 4.3. Er munur á fyritøkum eftir eyðkenni

Kappingareftirlitið hevur spurt um eyðkenni hjá fyritøkunum, ið hava svara uppá spurnakanningina. Hetta fyri at fáa eina fatan av um har eru ávís sløg av fyritøkum, sum kenna seg øðrvísi viðfarnar enn aðrar, ella um tann samlaða myndin er umboðandi fyri allar fyritøkur.

### *4.3.1. Staðseting*

Í fyrstu atløgu verður hugt at staðsetingina hjá teimum fyritøkunum sum eru spurdar. Av tí at luttøkan í ávísum støðum var avmarkað, eru nøkur øki løgd saman. Hetta er fyri at tryggja at fyritøkurnar eru dulnevndar. Tí var uttanlands, Vágar og Norðstreymoy lagt saman, umframt at Suðuroy og Sandoy var lagt saman.

**Ritmynd 4.5.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunalt útboð og innkeyp skilt á staðseting á fyritøku.




Sum vit síggja á myndini omanfyri, er tað í øllum økjum, ein stórur partur av fyritøkunum við royndum frá kommunalum útboði ella innkeypi, sum ikki kenna seg væl viðfarnar. Suðuroy/Sandoy er økið har flest fyritøkur kenna seg skeivt viðfarnar. Helmingurin av fyritøkunum í Suðuroy/Sandoy svara ja. Økið har fægst fyritøkur kenna seg illa viðfarnar er norðoyggjar, har 31,8% av fyritøkunum svara ja. Týðandi er tó at siga, at talan kortini er um ein lutfalsliga stóran part av fyritøkunum. Lutfallið av fyritøkum sum hava svara at tær ikki vita, sveiggjar ímillum ymsu økini. Í Norðoyggjum hava 18,2% svara at tær ikki vita, sum er tað lægsta talið. Hægsta lutfallið av fyritøkum sum hava svara at tær ikki vita er í Eysturoynni, har 29,4% siga seg ikki vita.

Samanumtikið kann tó sigast, at í øllum økjunum er eitt stórt lutfall av fyritøkum, sum kenna seg illa viðfarnar í samband við kommunalt útboð og innkeyp.

### *4.3.2. Ársverk*

Síðani er hugt at, hvussu støddin á fyritøkunum, máld í ársverkum, ávirkar um fyritøkurnar hava kent seg órættvíst lopnar um. Her eru fyritøkurnar deildar upp í bólkarnar: 1-4 ársverk, 5-9 ársverk, 10-19 ársverk og 20+ ársverk.

**Ritmynd 4.6.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunalt útboð og innkeyp skilt á ársverk í fyritøku




Fyri allar bólkar er galdandi, at lutfalsliga nógvar fyritøkur hava kent seg lopnar um. Størsti bólkurin er fyritøkur sum hava 5-9 ársverk, har 36,7% hava svara ja. Minsti bólkurin er fyritøkur við 10-19 ársverkum, har 28,6% meta seg hava verið umlopnar, sum aftur er ein týðandi partur.

Lutfallið av fyritøkum sum svara at tær ikki vita, er hægst fyri minsta bólkin av fyritøkum, og veksur í mun til støddina. Í minsta bólkinum svara 26,6% at tær ikki vita, ímeðan í størsta bólkinum svara 8,3% at tær ikki vita.

### *4.3.3. Umsetningur*

Í triðja umfari er tað støddin á fyritøkuni eftir umsetningi ið deilt er upp eftir. Her eru fyritøkurnar deildar upp í 5 bólkar. Hesir bólkar eru: fyritøkur við minni enn 500.000 kr. í umsetningi (< 500.000 kr.), fyritøkur við í millum 500.000 kr. og 1 mió. kr. í umsetningi (500.000 kr. – 1 mió. kr.), fyritøkur við ímillum 1 og 5 mió. kr. í umsetningi (1 – 5 mió. kr.), fyritøkur við í millum 5 og 10 mió. kr. í umsetningi (5 – 10 mió. kr.) og tær sum hava yvir 10 mió. kr. í umsetningi (> 10 mió. kr.).

**Ritmynd 4.7.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunalt útboð og innkeyp skilt á umsetning hjá fyritøku




Tá ið hugt verður at umsetningi sum eyðkenni, sæst á fyrsta sinni at ein bólkur greitt víkur frá. Her sæst at lutfalli av fyritøkum sum kenna seg illa viðfarnar, er serliga lágt fyri fyritøkur sum hava undir 500.000 kr. í umsetningi. 15,8% kenna seg illa viðfarnar. Í hinum bólkunum er lutfallið ímillum 32,7% og 47,1%.

Óvist er hví at lutfallið av fyritøkum við minni enn 500.000 kr. í umsetningi víkur frá hinum bólkunum. Møguliga er orsøkin at tey útboð og innkeyp hesar luttaka í, eru smærri og einfald útboð og innkeyp har møguleikin fyri misskiljingum er minni.

Lutfallið av fyritøkum sum svara at tær ikki vita, tykist ikki at vera heft at støddini á umsetninginum. Fyri allar bólkar er lutfallið ímillum 17,6% og 26,1%.

### *4.3.4. Aldur*

Seinasta eyðkenni sum er hugt eftir er aldur á fyritøkunum, har deilt er upp í fýra bólkar. Hesir bólkar eru: fyritøkur ímillum 0 og 5 ár (0-5 ár), ímillum 6 og 10 ár (6-10 ár), ímillum 11 og 20 ár (11-20 ár), og fyritøkur sum er eldri enn 20 ár (20 < ár).

**Ritmynd 4.8.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg verið fyri órættvísari framferð í samband við kommunalt útboð og innkeyp skilt á aldur á fyritøku




Fyri allar bólkar er galdandi, at lutfallið av fyritøkum sum kenna seg illa viðfarnar sveiggjar um ein triðing. Ímillum elstu fyritøkurnar er lutfallið 32,0%, sum er lægsta lutfallið, ímeðan fyri fyritøkurnar sum eru ímillum 11 og 20 ár er lutfallið 37,5%, sum er hægsta lutfallið.

Lutfallið av fyritøkum sum siga seg ikki vita, sveiggjar meira ímillum bólkarnar. Ímillum elstu fyritøkurnar eru flest sum siga seg ikki vita, har 30,0% siga seg ikki vita. Lægsta lutfall av fyritøkum sum siga seg ikki vita er hjá fyritøkunum sum eru ímillum 11 og 20 ár, har lutfallið er 12,5%.

Samanumtikið kann sigast, at uttan mun til hvussu fyritøkurnar verða bólkaðar, liggur lutfallið av fyritøkum sum kenna seg illa viðfarnar ímillum 28,6% og 50,0% við einum frávikið, har fyritøkurnar við lægsta umsetninginum hava eitt lutfall á 15,8%. Tað er sostatt staðfest, at tað er ein stór mistrúgv ímillum føroyskar fyritøkur um kommunal útboð og innkeyp,

uttan mun til eyðkenni, og peikar hetta á ein strukturellan trupulleika.

## 5. Staðseting, persónlig sambond og óreiðiligar gerðir

Í spurnakanningini varð spurt um, hvørji viðurskifti fyritøkurnar meta hava ávirkan á valið av veitara í útboðum og kommunalum innkeypi. Serliga varð spurt um, í hvønn mun tær halda, at staðseting, persónlig sambond og óreiðiligar gerðir kunnu vera orsøk til, at aðrar fyritøkur verða valdar framum. Í brotunum 5.1. til 5.3. verða hesi evni nærri viðgjørd.

### 5.1. Staðseting

Tað verður ofta sagt at kommunur skulu stuðla fyritøkum í nærumhvørvinum og eiga tískil at taka hesar framum. Í fyrstu atløgu ljóðar tað eisini skilagott. Hugsanin um at varðveita kommunalar pengar í nærumhvørvinum, øking av goodwill millum fyritøkur og kommunu og yvirskipað tankin um at halda lív í virkseminum í nærumhvørvinum er góð. Tó er tað so, at frá einum búskaparligum og kappingarligum sjónarmiði er hendan hugsanin ivasom. Hon kann stuðla eina ávísari fyritøku stuttskygt, men ofta vil slík fyritøka missa kappingarføri tí hon dovnar burtur, og í síðsta enda kemur hesin háttur at bjóða út, at økja um kostnaðin sum síðani fellur á skattgjaldarin.

Tá ið ein almennur stovnur velur at taka staðseting hjá fyritøkum við í metingini, bæði tilvitað og ótilvitað, vil tað gera at kappingin viknar. Tá ið veitarar á staðnum verða valdir framum, minkar tað um eggjanina til nýskapan, virkni og dygd. Umframt hetta, vilja veitarar uttanfyri nærumhvørvið gevast við at bjóða í kommununi. At færri fyritøkur bjóða, viðførir veikari kapping, sum leiðir til hægri kostnað og lægri góðsku. Kommunalur stuðul á hendan hátt, kann eisini hava við sær at staðbundni marknaðurin er borin av kommununi, og kann kommunan kenna seg bundna at halda fram við stuðlinum.

Tær fyritøkur, sum hava luttikið í kommunalum útboði, vórðu spurdar, um tær høvdu varhugan av at teirra staðseting uttanfyri kommununa sum bjóðaði út, var orsøkin til at tær vóru frávaldar í einum útboði ella innkeypi sum tær hava luttikið í. Til hendan spurningin vóru tað 40,8% av fyritøkunum, sum svaraðu 'ja', 32,0% svaraðu nei og 27,2% svaraðu 'veit ikki'.

**Ritmynd 5.1.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg lopnar um í samband við kommunalt útboð og innkeyp, har staðseting uttanfyri kommununa sum bjóðar út var orsøkin.




### 5.2. Persónlig sambond

Í brotinum omanfyri var nevnt at tað ofta verður sagt alment at fyritøkur á staðnum skulu stuðlast, bæði av politikarum og vanliga fólkinum. Tá ið tað kemur til framíhjárætt vegna persónlig sambond eru flest tó samd um at hetta er skaðiligt fyri kappingina. Somu skaðiligi árinini á kappingina standast av hesum, har hugurin at bjóða hjá teimum, ið ikki hava røttu sambondini, minkar. Umframt hetta kann kenslan av at hava ein fyrimun orsaka av kennskapi í kommununi, leiða til at nýskapan og virkni minkar. Hetta fellur umaftur á skattgjaldarin sum berur kostnaðin av at alment útboð ikki verður nýtt á besta hátt. Afturat omanfyri nevndu avbjóðingum kemur eisini eitt misálit á skipanina frá veitarunum. Um veitarar regluliga síggja at ávísur veitari sum heilt víst ikki kann veita tað sama støði vinnur, so missa veitarar álit á skipanina. Avleiðing er, at hugurin at geva boð minkar, umframt at tað kann viðføra eitt yvirskipað missálit á almennar stovnar. Hetta misálit kann hava neiliga ávirkan á annað virksemi hjá almennum stovnum.

Spurnakanningin vísir, at fleiri fyritøkur meta hetta vera viðurskifti, ið gera seg galdandi í kommunalu útboðstilgongdini. Tá spurt varð, um fyritøkurnar høvdu varhugan av at vera lopnar um orsaka av persónligum sambondum, svaraðu 34,7% av fyritøkunum 'ja'. Eins nógvar svaraðu 'nei' og 30,6% svaraðu 'veit ikki'.

**Ritmynd 5.2.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg lopnar um í samband við kommunalt útboð og innkeyp, har persónlig sambond var orsøkin.




## 5.3. Óreiðiligar gerðir

Svik og mutur í almennum útboðið er sjálvsagt ikki gott fyri eitt samfelag, og hevur hetta afturat teimum somu avleiðingum sum fyri framíhjárættur til staðbundnar fyritøkur og framíhjárættur bygt á persónlig sambond, eyka trupulleikar við sær. Her verður lagt upp til at vinnarin ikki verður funnin grundað á sjálvt boðið, men manipulering av dømingini. Tá verður ein nýggjur marknaður fyri ávirkan skaptur og ein partur av ágóðanum sum útboði skuldi givið kommununi, og harvið borgarum, ferð til privat persón. T.d. kann mutur vera har eitt starvsfólk í kommunalari tænastu, móttekur avsláttur ella gávu fyri innkeyp hjá kommununi. Orka verður løgd í at skapa eitt virði fyri fyritøkuna, uttan at fyritøkan í veruleikanum framleiðir eitt virði til samfelagið fyri hendan eyka kostnaðin, á fakmálið "rent-seeking".

Ein onnur avleiðing av mutri er ofta, at arbeiði ikki verður gjørt sum avtala varð. T.d. at byggjarí ikki hava tað dygd tey skulu hava ella at trygdin ikki er í lagið.

Í spurnakanningini kom eisini fram, at fleiri fyritøkur hava varhugan av at óreiðiligar gerðir kunnu hava ávirkan á val av veitara. Hetta sæst nærri stabbamyndini niðanfyri.

**Ritmynd 5.3.** Hava føroyskar fyritøkur nakrantíð kent seg lopnar um í samband við kommunalt útboð og innkeyp, har óreiðiligar gerðir var orsøkin.




Á stabbamyndini omanfyri sæst svar býti hjá fyritøkunum til spurningin um tær hava verið fyri órættvísari framferð í kommunalum útboði og innkeypi, har óreiðiligar gerðir vóru orsøkin. Her svara 15,7% av fyritøkum 'ja', 44,2% svaraðu 'nei' og 40,1% svaraðu 'veit ikki'.

Samanbera vit hesar tríggjar orsakirnar: Staðseting, persónlig sambond og óreiðiligar gerðir, er tað greitt at fyritøkurnar í spurnakanningini meta at staðsetingin og persónligu sambondini eru oftari ein orsøk til at tær kenna seg illa viðfarnar enn óreiðiligar gerðir.

Ein onnur orsøk kann vera, at óreiðiligar gerðir eru torførari at staðfesta enn staðseting og persónlig sambond. Í hesum sambandi skal vísast á, at heili 40,1% svara at tær ikki vita um óreiðiligar gerðir fara fram.

# 6. Ynskja føroyskar fyritøkur reglur?

Í brotunum omanfyri er staðfest, at ein stórur partur av føroyskum fyritøkum kenna seg ikki vera rættvíst

viðfarnar á kommunala útboðsmarknaðinum. Tað tykist eisini at vera ein yvirskipað fatan á marknaðinum um at kommunal útboð fara ikki rætt fram. Tí eisini tær fyritøkurnar, sum ongar royndir hava frá kommunalum útboðið, meta at staðseting, persónlig sambond og óreiðiligar gerðir eru til staðar í samband við kommunal útboð.

Í spurnakanningini verður spurt, um fyritøkurnar ynskja reglur í samband við kommunal útboð og innkeyp

Fyrsti spurningur ið er settur føroyskum fyritøkum í hesum høpi er, um tær meta at greiðar reglur skulu gerast um útboð og innkeyp í kommunalum høpi. Svarini síggjast niðanfyri.

**Ritmynd 6.1.** Ynskja føroyskar fyritøkur greiðari reglur í kommunalum útboði?




Her sæst týðiliga, at luttakandi fyritøkurnar halda, at reglur skulu gerast fyri kommunal útboð og innkeyp. Sløk 75% ynskja, at reglur verða gjørdar um kommunalt útboð og innkeyp. Har ímóti er tað bert 10% av fyritøkunum sum ikki ynskja broytingar. Stívliga 15% siga seg ikki vita.

Hjá tí almenna er eitt rundskriv um útboð og innkeyp sum landsstovnar skulu fylgja, og tí hevur spurnakanningin eisini spurt um fyritøkurnar meta at hetta rundskriv hevur tann ynskta virknaðin. Tí er í fyrstu atløgu spurt um fyritøkurnar meta at hetta rundskriv verður fylgt.

**Ritmynd 6.2.** Meta føroyskar fyritøkur at rundskrivi fyri føroyskar landsstovnar verður fylgt?




Slakur helmingur sigur seg í hesum føri ikki vita, ímeðan áleið ein triðingur metir at rundskrivi ikki verður fylgt og bert ein slakur fimtipartur av fyritøkunum meta, at landsstovnarnir í Føroyum fylgja hesum rundskrivi.

Síðani eru fyritøkurnar spurdar um rundskrivið er nøktandi.

**Ritmynd 6.3.** Meta føroyskar fyritøkur at rundskrivi fyri landsstovnar er nøktandi?




Her sæst ein líknandi mynd, har áleið helmingurin sigur seg ikki vita. Her er tað tó eitt sindur fleiri sum svara ja, har áleið ein fjórðingur metir at rundskrivi er nøktandi, og ein fjórðingur metir tað ikki vera nøktandi.

Millum tær fyritøkurnar sum luttóku í spurnakanningini, er eitt greitt ynski um at reglur verða gjørdar um kommunalt útboð og innkeyp, men eisini at landið verður betri til at halda sínar reglur, og at tær verða dagførdar.

## 7. Viðmerkingar frá fyritøkunum

Spurnakanningin gav eisini fyritøkunum høvi at greiða nærri frá sínum royndum við kommunalum útboðum og innkeypi. Harumframt fingu tær møguleika at koma við uppskotum til, hvussu tær meta, at støðan kundi verið bøtt. Viðmerkingarnar í spurnakanningini geva eina greiða mynd av, hvussu fyritøkur uppliva kommunal útboð kring landið. Tær lýsa eina felags fatan av órættvísari og óvirkna kapping, og at avgerðir mangan verða tiknar á einum grundarlagið, sum ikki er nóg gjøgnumskygt.

*"Vit fingu ikki  loyvið at bjóða orsaka av at vit ikki vóru í kommununi."*

Fleiri fyritøkur vísa á, at staðsetingin er avgerandi fyri, um tær yvirhøvur hava møguleika at luttaka í útboðnum. Ofta verður sagt, at kommunur hava lyndi til at velja somu veitarar aftur og aftur, hóast aðrir veitarar kunnu bjóða bæði betri prís og dygd. Fleiri greiða frá, at tey aldri verða spurd, hóast arbeiðið hóskar væl til teirra fakøki. Summi skriva, at tey hava sent inn tilboð og ongantíð fingið svar aftur — "vit hoyrdu bara frá tí, sum vann, at vit vóru nógv bíligari," sum ein fyritøka sigur. Hjá øðrum verður beinleiðis sagt, at tey vóru vrakað, tí tey ikki vóru skrásett í kommununi.

Hetta  bendir á at útboðstilgongdin hjá kommununum verður upplivað sum ein stirvin og órættvís skipan, har landafrøðiliga staðsetingin ger munin, og ofta uttan at tað er fakliga grundað.

Eisini verða persónlig sambond ofta nevnd sum ein afturvendandi trupulleiki í samband við kommunal útboð og innkeyp. Fyritøkur greiða frá, at nøkur hava betri atgongd, tí starvsfólk í kommununi kenna fólkini handan fyritøkuna. Summi skriva beinleiðis, at arbeiðið fór til "tann, sum onkur kendi," og at tær sjálvar ikki kundu kappast við slík sambond. Aðrar siga frá, at tær hava verið kritiskar mótvegis kommununi og nú kenna seg útihýstar. Men hóast orðini eru strong, er kjarnin tann sama: trúgvin á, at valið av veitara verður mett sakliga, er veik í nógvum førum. Fyri fleiri er tað ein varhugi, sum er torførur at prógva, men sum kortini fyllir nógv, tí útboðsúrslitini so ofta passa saman við sambondunum, sum øll kenna til.

*"Og tá tær so bjóða tílík innkeyp út, verður so at siga alt vent og snara, soleiðis at vinir og kenningar kortini fáa uppgávuna."*

Tað triðja evnið er óreiðiligar gerðir, sum fyritøkur uppliva sum óreint spæl, manglandi gjøgnumskygni ella brot á vanligar mannagongdir. Her verður sagt frá mongum tilburðum: Útboð, sum verða útsett, broytt ella trekt aftur í síðsta løtu, arbeiði, sum verður latið uttan útboð, og fortreytir, sum verða broyttar, soleiðis at ávísur veitari ikki longur kann luttaka. Ein fyritøka lýsir tað soleiðis: "Vit skuldu koma at fáa tilfarlistan, men so varð arbeiðið latið øðrum uttan útboð, hóast avtalað var annað." Aðrar nevna, at tilboð verða latin inn, men ongin grundgeving verður givin fyri, hví tey ikki sluppu víðari.
Fyritøkurnar kenna útboðstilgongdina sum eina óvissa og óálítandi tilgongd, tí avgerðirnar ikki tykjast hava eitt greitt og gjøgnumskygt grundarlag.

*"Tað er ofta ógreitt, hvat uppgávan gongur út uppá. Tað vil siga, at vit skulu tulka, hvat skal gerast, og tá ið man fer at leggja prís, má tað vera púra greitt, hvat man ynskir. Hettar er frustrerandi, tí vit brúka nógva tíð uppá at rokna tilboð út."*

Tá tær mongu viðmerkingarnar verða settar saman, er heildarmyndin greið: Spurdu fyritøkurnar halda at kommunal útboð og innkeyp eru merkt av stórum ójavna, órættvísi og væntandi gjøgnumskygni.

Tað er týðiligt, at álit er ein av høvuðsavbjóðingunum. Fyritøkur vita ikki altíð, um úrslitið av útboðnum er grundað á tað, ið eigur at telja, ella nakað heilt annað.

## 8. Hvat meta fyritøkurnar kann gerast fyri at bøta um støðuna

Fyritøkur vísa ikki bara á trupulleikarnar í kommunalu útboðunum, men eisini á ítøkilig stig, sum tær halda kunnu bøta um støðuna. Eitt av teimum mest afturvendandi ynskjunum er, at land og kommunur fáa ein felags útboðsportal, har øll útboð verða samlað og

gjørd alment atkomulig. Hetta verður hildið at kunna tryggja javna og rættvísa atgongd.

Harumframt leggja fyritøkur stóran dent á tørvin á greiðari reglum fyri kommunalar uppgávur. Í dag eru almennir stovnar álagdir at bjóða út sambært rundskrivi, meðan kommunurnar ikki eru, og hetta kenna fyritøkurnar sum ein av teimum størstu orsøkunum til ójavna. Nógvar fyritøkur mæla tí til felags, bindandi mannagongdir, sum tryggja, at allar uppgávur yvir ávíst mark verða boðnar út, og at grundgevingar fyri valinum av vinnara verða almannakunngjørdar.

Eitt annað týðandi punkt er eftirlit. Fyritøkur vísa á, at reglur og leiðreglur bara hava týdning, um tær eisini verða fylgdar, og at brot fáa fylgjur. Tær mæla tí til óheft eftirlit við kommunalum útboðum so ósakligar avgerðir ikki verða standandi óátalaðar.

Harafturat verður nógv tosað um, at útboðstilfarið sjálvt eigur at vera munandi greiðari enn tað ofta er. Fyritøkur vísa á, at tilfarlistar, krøv og metingargrundarlag ofta eru ógreið, ella so opið fyri tulking, at tað kann geva summum veitarum fyrimun. Tær leggja tí dent á, at útboðstilfarið má vera so nágreiniligt, at allir veitarar hava somu upplýsingar og kunnu bjóða út frá jøvnum fortreytum.

Samanumtikið ynskja fyritøkurnar í spurnakanningini greitt og sakligt útboðstilfar, javna atgongd til útboð, felags reglur og mannagongdir, og eitt eftirlit, sum tryggjar, at alt gongur rætt fyri seg. Tað eru ítøkilig og realistisk stig, sum eftir teirra tykki kunnu styrkja álitið, kappingina og dygdina í kommunalum útboði og innkeypi.

## 9. Útgangur/niðurstøða

Spurnakanningin hjá Kappingareftirlitinum vísir greitt, at stórur partur av spurdu fyritøkunum ikki hava álit á kommunalum útboði og innkeypi, óheft av staðseting, ársverkum, umsetningi og aldri á fyritøkunum.

Fleiri hava varhugan av, at staðseting, persónlig sambond og óreiðiligar gerðir hava ávirkan í samband við kommunal útboð og innkeyp, og at sjálvt útboðsgrundarlagið ikki altíð er gjøgnumskygt ella javnbjóðis. Hetta hevur neiligar avleiðingar fyri kappingina og fyri møguleikan hjá fyritøkum at bjóða vørur og tænastur á jøvnum føti.

Hóast spurnakanningin hevur tær avmarkingar, at hon er sjálvboðin og byggir á hugburð, benda úrslitini kortini týðiliga á, at missálitið á verandi skipan er stórt.

Í spurnakanningini hava fyritøkurnar eisini fingið høvi at koma við egnum viðmerkingum. Viðmerkingarnar geva Kappingareftirlitinum høvi at fáa innlit í, hvat fyritøkurnar halda eigur at broytast.

Serliga nógvar viðmerkingar snúgva seg um at fyritøkurnar ynskja størri opinleika og gjøgnumskygni í tilgongdini, og at arbeiðsgongdirnar verða skipaðar soleiðis, at allir veitarar hava somu atgongd og somu upplýsingar.

Nógvar fyritøkur hava eisini viðmerkt, at tær ynskja ein felags útboðs- og innkeypsportal fyri kommunur og land, soleiðis at øll útboð verða savnað á einum stað. Fyritøkurnar ynskja í hesum sambandi, alment eftirlit við um reglurnar verða fylgdar.

Kappingareftirlitið er av tí greiðu fatan, at hóast tað ikki ber til at staðfesta tær støður sum fyritøkurnar vísa á, so er hetta teirra upplivingar av støðunum, og tí hava tær týdning. Um ein fyritøka heldur at tað ikki ber til at vinna eitt boð í granna kommununi, so letur hon ikki boð inn, óheft av um tað veruliga er so.

Tá so nógvar fyritøkur kenna seg settar til síðis ella ikki viðgjørdar rættvíst, so er tað eitt tekin um, at verandi skipan, har ongar reglur eru fyri kommunal útboð og innkeyp, ikki er nøktandi.

Hóast spurnakanningin ikki staðfestir um rætt verður fari fram ella ikki, so staðfestir spurnakanningin eitt væntandi álit á verandi skipan.

Grundað á hesa kanning, mælir Kappingareftirlitið tí til, at verandi reglur fyri alment útboð og innkeyp verða dagførdar, umframt at tær eisini skulu fevna um kommunala geiran.